VIÐMERKINGAR

# Kanning av barnaverndarmáli

Maria Jacobsen

**Til**
**Hans Pauli Strøm**
**landsstýrismaður**
**Eirargarður**
**100 Tórshavn**

Í lesarabrævi í Dimmalætting hin 08.02.2005 setti eg tygum nakrar spurningar. Biðið varð um, at tygum svaraðu í fjølmiðlunum. Hin 04.04.2005 fekk eg skriv frá tygum, dagf. 11.03.200, poststemplað 01.04.2005, har tygum boða frá, at tygum ikki ynskja at svara í fjølmiðlunum, men skulu royna at svara spurningum mínum í skrivinum.

Síðani siga tygum: "landsstýrismaðurin kann upplýsa tygum, at Karup kommuna hevur fingið allar upplýsingar, sum vóru neyðugar hjá kommununi at hava, fyri at kunna taka støðu í málinum. Tórshavnar kommuna hevur kunnað Karup kommunu støðugt um málið, áðrenn Karup kommuna tók endaliga støðu í málinum".

Av tí, at tygum sostatt als ikki svara spurningum mínum um **kanningina og frágreiðingina** og tí at eg meti málið hava stóran almennan áhuga, fari eg at endurtaka bræv mítt her:

**Opið bræv til Hans Paula Strøm, landsstýrismann**

Í grein við heitinum "Sosiala deild undir sjóneykuna" í Sosialinum hin 5. juni 2004 úttalar Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, seg viðv. ávísum barnaverndarmáli, ið varð nógv umtalað í fjølmiðlunum í fjør. Úrslitið av málinum gjørdist sum kunnugt, at tvær systrar vórðu verðandi í Føroyum, meðan beiggin hin 16. aug. 2004 varð fluttur til Danmarkar á samdøgursstovn.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sigur í samrøðuni, at hann "gjarna vil kanna, um Tórshavnar býráð hevur lýst málið nóg væl, og um Karup kommuna hevur fingið alt at vita í málinum, og tí er ein kanning sett í verk".

Víðari sigur landsstýrismaðurin, at hann ikki veit, nær hann fer at fáa frágreiðingina um samskiftið millum Tórshavnar býráð og Karup kommunu.

Mær kunnugt hevur einki verið at frætt aftur frá hesi kanning, og loyvi eg mær tí at seta landsstýrismanninum hesar spurningar:

1. Hvør varð settur at kanna omanfyri nevnda mál?
2. Hevur landsstýrismaðurin fingið endaligu frágreiðingina?
3. Hvør var niðurstøðan í frágreiðingini?
4. Um frágreiðingin ikki er komin, nær kann hon so væntast?

Eg vænti, at tygum nú svara spurningum mínum í fjølmiðlunum og fari samstundis sambært lógini um alment innlit og fyrisitingarlógini at biðja um alment innlit í kanningina.

Avrit av hesum skrivi er sent Dimmalætting og Sosialinum.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Viðmerkingar til Sunnevu Tyril og Beintu Petersen

Annemi Joensen

Tá eg avgjørdi at skriva lesarabræv umhandlandi politisku avgerðina at seta útbúgvingina til heilsuatstøðing á stovn í Føroyum, var ikki ætlanin at niðurgera heilsuatstøðingarnar , teirra arbeiðið, og teirra útbúgving. Ei heldur var ætlanin at leggja upp til manglandi samstarv fakbólkarnar ímillum. Tí samstarv eigur og skal vera millum <u>allar</u> fakbólkar innan, í hesum føri, heilsuverkið.

Heldur var ætlanin við at gera nakrar viðmerkingar, út frá einum landsbúskaparligum - og einum tørvsjónarhorni.

Tí er tað spell, at Sunneva Tyril og Beinta Petersen, taka bræv mítt sum eitt: "*...óhøviskt álop..*" sitat enda, á heilsuatstøðingar og teirra útbúgving. Tað harmist eg um.

Heldur var ætlanin, at fingið eitt aftursvar frá teimum politisku myndugleikum, sum vara av hesi avgerð.

Tó føli eg meg noydda at gera nakrar viðmerkingar til aftursvarini frá omanfyri nevndu kvinnum.

Tó, fyrst vil eg nýta høvi til at fáa svara einum av teimum spurningum, eg setti í lesarabrævinum. Sunneva Tyril skrivar, at hennara fakfelag hevur verið við til at leggja heilsuatstøðingaútbúgvingina til rættis. Kanska er hon tí før fyri at svara mær, um, í brævinum nevnda, tørvskanning er gjørd. Um so — nær er hon gjørd, og hvat hon vísti.

Harnæst, tá eg verið endurgivin fyri at meta heilsuatstøðingarútbúgving ina fyri at vera vánaliga, havi eg trupult við at kenna tað aftur. Eg havi skrivað: "*...lægri vitanarstøðið — útbúgvingina til heilsuatstøðing, heldur enn at gera meira brúk av eini vitansframleiðslu á einum hægri vitanarstøði..*" sitat enda, "*... sjúkrarøktarfrøðingarnir hava eina stórri og breiðari vitan enn heilsuatstøðingarnir....*" sitat enda. Hettar er nú einaferð so: Sjúkrarøktarfrøðiútbúgving in er ein bachelorútbúgving, meðan heilsuatstøðingaútbúgvingin er ein miðnámsútbúgving.

Sunneva Tyril skrivar: "*....hvør skal gera tað (praksis), tá alt sjúkrarøktararbeiðið verður gjørt av høgt lærdum frøðingum...*". Hvat hon her sipar til, havi eg trupult at skilja. Men um hon heldur at heiti *frøðingur* fer at viðføra, at sjúkrarøktarfrøðingar flyta seg frá sjúklinginum, má tað skildast manglandi vitan um nýggju sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina. Sum Sunneva Tyril sjálv skrivar, so merkir frøði vísind. Vísind ger ein meira vitandi um, í hesum føri, hvørji faklig krøv skulu gangast á møti, fyri at passa sjúklingar optimalt. Tí flytir nýggja útbúgvingin sjúkrarøktarfrøðingin enn nærri at sjúklinginum.

Sunneva Tyril tulkar spurningar sum *pástandir*. Mær vitandi er hettar ikki so. Heldur eru teir upplegg til onnur at svara uppá/hugsa um. At Sunneva Tyril heldur nakað annað, má standa fyri hennara egnu rokning. Sama er galdandi fyri *hugflog*. Tað er, sum hon sjálv sigur, *frítt*.

Tey starvsumráðir, sum Sunneva Tyril nevnir, sum umráðir har heilsuatstøðingar í dag starvast, eru kend sjúkrarøktarøkir. At heilsuatstøðingar arbeiða innan hesi økir, skildast, sum Sunneva Tyril sjálv er inni á, tí sjúkrarøktarfrøðingar ikki søkja hesi størv. Mest sannlíkt er, tí allar eru í øðrum størvum — tað eru ongir arbeiðsleysir sjúkrarøktarfrøðingar. Tí er truppult at mannað leys sjúkrarøktarfrøðingistørv. Eg dugi ikki at síggja, at nevnd verða nøkur nýggj røktarumráðir, serliga ætlað heilsuatstøðingum.

Seinast so skrivar Sunneva Tyril: "*..... heilsuatstøðingar eru fleksiblir og ágrýtnir og kunnu brúkast allastaðni í heilsuverkinum....*" sitat enda, eisini skrivar hon at: "*.....vælvirkandi starvsbólk, sum kann fara til verka, hvar tað skal vera í heilsiverkinum"*. Sitat enda. Um hon við hesum vil siga, at hettar ikki er galdandi fyri sjúkrarøktarfrøðingar, skal eg lata vera ósagt. Men mær vitandi gongur sjúkrarøktarfrøðingurin eisini nevndu krøvum á møti.

Tað er møguligt, at heilsuatstøðingar eisini fara at tulka hesar viðmerkingar sum enn eitt álop á teir. Tað er ikki ætlanin, men væntast kann at, sum orðatakið sigur " som man råber i skoven, får man svar". Tí tær viðmerkingar, sum , í brævinum nevndu kvinnur, gera, leggja heldur ikki upp til samstarv. Hettar leggja tær sjúkrarøktarfrøðingum til last. Men tað er altíð léttari at rópa: "*Góða mamma, tað var ikki eg. Børnini tey skumpaðu meg*". Ella heldur at "*fara eftir manninum heldur enn bóltinum"*.

# Aftursvar til Annemi Joensen

Gunvør Sigurðsson

Kann ikke lata hettar fara ósvara aftur við borðinum

Fyrst vil eg siga, at tá íð eg læs greinina hjá Annemi Joensen helt eg at hon var á einum einum rættiliga lágum og klandrutum støði.

Vælsigna verið í teg Annemi, tað er uppá tíðina at tú og aðrar vi tær, taka hasar "skyklapparnar" burtur, so tit kunne síggja rundan um tykkum, síggja at tað eru ikke bara sjúkrarøktarfrøðingar, ið kunnu.

Tað eru nógvir sjúkrahjálpara, heilsuhjálpara, pleygara og heilsuatstøðingar, ið gera eitt megnar arbeiði, alt innan heima røkt, sambýlum, ellisheimum- og -røktarheimum, psykiatri, dagtilhaldum, sjúkrahúsum, og yvaleyst aðrastaðni sum eg ikke veit um.

Tað er ikke altíð tann hægsta, breiðasta ella djúpsta vitamin, ið er tann besta, tað kemur so sanniliga eisini ann uppá hvat í ein tímir og brennir fyri.

Sjálv havi eg arbeitt i nógv ár sum sjúkrahjálpari og 7 tey seinastu árini sum heilsuatstøðingur. Eg havi arbeitt saman vi sjúkrarøktarfrøðingum alla tíðina, og í nógvum førum hava tær eina større komputansu enn eg, men í grundleggjandi sjúkrarøkt eri eg líka góð, og til tíðir betri enn ein sjúkrarøktarfrøðingur, við mínari fakligari vitan.

Eg haldi avgjørt tað er brúk fyri okkum øllum, og eg haldi at tað er alneyðugt at vit ikke gloyma menniskja, og her hugsið eg um tað fysiska, psykiska, sosiala og tað andaliga, og ikke læta alt enda í klandri og makt.

Tó vil eg siga at eg havi arbeitt saman vi nógvum sjúkrarøktarfrøðingum, vit hava arbeitt væl saman og tær hava veruliga víst mær álit og virismett mítt arbeið

Til polittikarnar, takk skulle tit hava íð fingu sett heilsuhjálparaskúlan á stovn, og vónandi gonger ikki alt ov long tíð, til heilsuróktarskulin kann taka sínar fyrstu næmingar inn.

# Hugleiðing um standmyndir

Hildibjørt Gulklett

Enn ein standmynd skal prýða Havnina.

Álvaratos! Eigur Tórshavnar Býráð so nógvar pengar, at teir ikki vita, hvat teir skulu brúka teir til?

Tey vita ikki, hvat teir skulu gera við tey gomlu!

Gamlir óhjálpnir røktarsjúklingar verða bara sendir til hús av sjúkrahúsinum í rullustóli. Hvat við at stovna nøkur eldrabýli?

Tað hevði verið aðrar standmyndir, sum høvdu komið til stóra nyttu og lívgað um tey mongu gomlu, sum so kundu fingið eitt virðiligt lív. Hesi gomlu, sum ongantíð hava ligið øðrum til byrðu og altíð hava svarað hvørjum sítt.

Tær standmyndir høvdu prýtt…